## DAGSINS MEINING

# Hóvliga gongdin vann

Tað er eingin loyna, at Sambandsflokkurin gjørdist stóri vinnarin á valinum – og Tjóðveldisflokkurin veruligi taparin, hóast hann bleiv næststørstur. Formaður floksins gjørdi púra greitt undan valinum, at hetta var at meta sum ein fólkatkvøða fyri fullveldi ella sambandi. Úrslitið bleiv, at samgongan misti meirilutan og fekk minni enn 50% av atkvøðunum. Við øðrum orðum endaði hasardpolitikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum við einum stórum bakkasti. Meiriluti av veljarunum vrakaði hann. Hóast hesa sannroynd roynir formaðurin kortini at vísa aftur, at fullveldið tapti, tí tað stendur á jøvnum millum andstøðu og samgongu í tingmannatali. Hetta er at sleppa sær undan veruleikanum, tí tað eru atkvøðuprosentini vit skulu hyggja eftir í hesum føri. Og tey tala sítt greiða mál.

Vit hava fleiri ferðir gjørt vart við, at víðgongda fullveldiskósin hjá tjóðveldisleiðsluni fór hvørki at gagna flokkinum ella sjálvstýrissøkini uppá longri sikt. Vit hava ávarað móti hesum og lagt upp til, at flokkurin heldur enn at koyra við 180 km. ferð setti ferðina niður og fór undir eina hóvligari gongd saman við øðrum flokkum, sum eisini vilja vinna Føroyum meira stjálvstýri. Men tjóðveldisleiðslan vildi ikki lurta eftir øðrum. Heldur ikki eftir hóvligu kreftunum í sínum egna flokki, ið heldur ynsktu konsensus tvs. semjusøkjandi politikk heldur enn solospælið og harvið konfrontatiónina. Ístaðin fyri at lodda dýpið í fólkinum og øðrum flokkum valdi leiðslan beint tvørturímóti at gera hetta valið til eina fólkaatkvøðu millum loysing og samband. Ístaðin fyri at lurta eftir signalunum frá hinum samgonguflokkunum fór Tjóðveldisflokkurin undir eitt valstríð, har lagt varð upp til eina øsing móti øllum øðrum flokkum, sum bara vildu tøma landskassa og borðreiða við lívslygnum. Leiðslan fór so langt sum at ganga frá løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya til at framskunda gongdina og legði upp til, at Føroyar longu kundu gerast fullveldi í komandi skeiði.

Hvat fekk sama politiska leiðslan so burtur úr! Meira enn 50% av fólkinum segði nei. Men ikki nokk við tí. Onnur 25% av veljarunum, teir flestu hjá Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum søgdu eisini nei til víðgongdu fullveldiskósina hjá Tjóðveldisflokkinum. Meira hóvligu kreftirnar í hesum flokkum, eitt nú í fólkafloksháborgini í Havn, vunnu ein greiðan sigur, kreftir, sum Tjóðveldisflokkurin hevur skýrt ramasta samband og annað verri. Og úrslitið gjørdist eisini, at sjálvstýrisveljararnir vrakaðu fullveldissinnaða partin av flokkinum og valdu inn tingmann, ið gongur inn fyri eini hóvligari sjálvstýristilgongd. Leggja vit alt hetta saman og seta hetta í sambandi við tær útmeldingar sum løgmaður er komin við og sum als ikki eru í tráð við valstríð Tjóðveldisfloksins, so er tað ein nógv viknaður og uppaftur meira isoleraður Tjóðveldisflokkur vit síggja eftir valið. Men hvør veit, kanska valúrslitið fer at fáa Tjóðveldisflokkin til at taka í egnan barm og vilja semjast við aðrar flokkar um eina meira hóvliga sjálvstýristilgongd. Tá eigur flokkurin avgjørt at verða áhugaverdur fyri aðrar at samstarva við. Spurningurin tá er um tað er ov seint, og um tað kann hugast, at løgmaður og flokkur hansara út frá óhepna samstarvinum fara at venda Tjóðveldisflokkinum bakið og venda sær til hinar stóru andstøðuflokkarnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Í Týsklandi hevði hann verðið revsaður

**Heri Eysturlíð**



Í valsendingini í ÚF fríggjakvøldið vísti Jóannes Eidesgaard seg - sum ikki einaferð - frá síni noblu síðu, tá ið hann samanbar samgonguna við tær kreftir, sum virkaðu í Týsklandi fyri sjeyti árum síðani. Eisini kom fram, at hann helt tað vera í fínasta lagi, at hann fyri ári síðani hevði samanborið eina semju í samgonguni við ta tiltiknu Krystallnáttina - náttina, sum var byrjanin til jødatýningina.

Nakrir av Eidesgaardsa lærusveinum hava tikið hesi meistarans orð til sín og endurtikið tey í bløðunum. Onkrir av vatnberarunum í flokkinum halda enntá teir føroyingar, ið ikki góðtaka slíkan vitleysan málburð, vera fullar í sjúkligum hatri.

Veri teir glaðir fyri, at Jóannes Eidesgaard ikki er politikari í Tðsklandi.

Eftir øllum at døma eru týskarar meira hatskir enn føroyingar, tí í Týsklandi hevði Jóannes Eidesgaard verið revsaður fyri slík úttalilsir. Í Týsklandi er bannað við lóg at trivialisera jødatýningina, nakað sum Jóannes Eidesgaard so sanniliga hevur gjørt seg sekan í, annaðhvørt tað nú er medvitið ella í blektaðum bðttiskapi og fákunnu. So mætir menn sum Churchill og Jeltsin hava sannað, at ringt er at tosa beint frá livrini, tá ið hon liggur í spritti.

Fleiri EU-lond umhugsa at samtykkja líknandi lóg sum ta týsku viðvíkjandi jødatýningini.

## Útiløgufrensur

Nú valið er farið
og einki fekst svarið
um hvør nú skal landinum ráða
so ymiskt tey meta
men øll vilja seta
seg sjálvan í sessin tann háa

Nú øll hava vunnið
og frens hava funnið
sum skal hesar pástandir prógva
í loftmiðlastøðum
eins væl sum í bløðum
grundgevingar fáa vit nógvar

Alt landið jú visti
at samgongan misti
sín meir'luta - skeiðið er runnið -
tað burtur má tigast
tó vil Zacharias
nú halda at hon hevur vunnið

**edvard**

# Eg vil ikki vera ein partur av tí, men tað er samtykt at eg má!

**Ingi Kirke**

**Hvat er hetta fyri nakað?**
Jú tað snýr seg um okkara sjúkrakassa.

Føroya Løgting tvingar øll sum búgva í Føroyum at vera limir í sjúkrakassanum!

Eg helt vit høvdu so mikið av fríheit í Føroyum, at vit kundu velja at vera limir í tí vit vildu vera limir í! Men nei!

Nær fer Løgtingi at tvinga meg inn í ein ølklubb, eina losju, ella kanska fara tær at tvangsinnleggja meg á psykiatriskudeild.

**Hví?**
Hvat er endmálið?

Hví tvinga fólk til nakað tey ikki vilja vera ein partur av?

Eg nokti at gjalda mínar rokningar frá sjúkrakassanum, og hvat hendir so? Jú, tað verður tikið frá mær við lóg, gjøgnum skattin! Stuttligt ha? Og ikki nokk við at teir stjala mínar pengar, teir skulu enntá hava ómaksløn fyri at stjala teir! Mær vitandi í minsta lagi Kr. 300,00.

**Er tað dýrt?**
Er tað dýrt at vera tvangslimur í sjúkrakassanum? Ja, tað er!

Og tað besta er, at teir avgera sjálvir hvussu nógv vit skulu gjalda, tí vit mugu gjalda! Tað er samtykt við lóg!

Tað næsta verður sikkurt, at teir samtykkja, at gjaldið skal enn longur upp! Jubbi!

**Frælsið?**
Hvar bleiv frælsið av?
Higartil havi eg ímynda mær eitt Føroyar í frælsið, har hin einstaki kann velja hvat hann vil hava við at gera!

Men Føroya Løgting hevur samtykt við lóg, at RÆNA okkara frælsið!

Eg sum "fríur" føroyingur, MÁ vera limur í sjúkrakassanum, eg sleppi ikki burturúr! Mítt frælsið er stolið av Føroya Løgtingi! Tað er samtykt við lóg, at eingin av okkum kann vera frælsur! Er tað ikki deiligt? Kanska er tað tí, at eingin av okkum hevur nakað millum oyruni sum er brúkiligt! Halda teir!

**Kann nakar hjálpa mær?**
Er tað nakar politikkari sum vil arbeiða fyri, at eg kann fáa mítt frælsið aftur?

Lovar tú mær tað, so er mín stemma tín - næstu ferð!

**Hvat er trupulleikin?**
Tú undrar teg kanska yvir hvat tað er sum er so ræðuligt við at vera limur í sjúkrakassanum.

Tað er ikki ræðuligt at vera limur í sjúkrakassanum. Tað er frælsið sum er tikið frá mær! Eg vil út, men eg sleppi ikki! Tað vil í veruleikanum siga, at um gjaldi ferð upp á Kr. 20.000 um mánaðin, so má og skal eg gjalda! Tað er samtykt!

Eg veit ikki hvussu tú hevur tað, men tá eg ikki kann sleppa burturúr nøkrum sum eg ikki vil vera ein partur av, tá síggji eg tað, sum at mítt frælsið er tikið frá mær, og er frælsið fyrst tikið frá mær við lóg, so er ikki nakað sum er ómøguligt at fremja, við eini samtykt í Føroya Løgtingi!

Kom hetta mál nakrantíð út til fólkaatkvøðu?

**Nokk fyri hesuferð!**
Eg skrivi nokk aftur tá teir hava stjolið mínar pengar!

Og minnist til ómakslønina!!!!!!!!!!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# So sluppu skúlanæmingarnir í Vági avstað




*Klokkan 20 mikukvøldið sluppu næmingarnir í 7. flokki í Vágs Skúla við Roc Amadour til Havnar og hetta var fyrsta stig á leingi fyrireikaðu námsferðini til Danmarkar og Noregs, sum verkfallið nærum setti eina bremsu fyri*

*Mynd: D.Olsen*

**Mikukvøldið eydnaðist tað 7. flokki í Vági at sleppa norðureftir. Hetta er fyrsta stig á longi ætlaðari námsferð til Danmarkar og Noregs, men sum verkfallið nærum setti eina bremsu fyri**

FERÐSLA
*Dagfinn Olsen*

Verkfallið hevur avbyrgt Suðuroynna í meira enn 14 dagar, tá tað viðvíkur vanligum ferðafólkaflutningi. Hetta hevur m.a. 7. flokkur í Vági merkt, tí til tað síðsta hevur verið ivi um, hvørt tey sluppu á námsferðina, sum tey hava fyrireikað síðani tey gingu í 4. flokki.

Útvarp Føroya segði søguna um skúlaflokkin í Vági, tá ÚF vitjaði í Vági týsdagin í samband við løgtingsvalið. Eftir hetta fekk flokkurin nøkur tilboð um flutning um Suðuroyarfjørð, men tá var ætlan løgd um at fara við Roc Amadour, sum kom aftur úr Íslandi mikudagin.

Roc Amadour hevur verið og selt í Íslandi eftir góðan túr, men hevði ringt veður á heimleiðini, so hann var nakað seinkaður. Eisini bíðaðu teir nakað, áðrenn teir sluppu úr Íslandi fyri ódnarveður.

Men mikudagin kom Roc Amadour á Vág og klokkan 20 mikukvøldið fóru næmingar og lærarar til Havnar við Roc Amadour. Har skal báturin gera nakrar umvælingar, áðrenn hann hóskvøldið aftur kemur á Vág, fyri síðani at fara beinleiðis aftur á fiskileið.

### Missa dagar

Foreldur og onnur veitraðu farvæl á bryggjuni í Vági klokkan 20 mikukvøldið. Í Havn skuldi flokkurin gista á Skansanum, fyri síðani at fara um Vestmannasund við Silju seinnapartin hósdag.

Ætlandi skuldi flokkurin flúgva mikudagin, men fekk flogferðina útsetta til hóskvøld. Ferðin er longd við einum degi, men tó er tað so, at tey missa ein dag av námsferðini, orsakað av verkfallinum.

Í Vági hava røddir verið heldur ivasamar um, at undantak hevur verið givið at flyta aðrar bólkar um eittnú Vestmannasund við tí grundgeving, at ferðin hevur verið fyrireikað leingi. Neyvan øvundar nakar nøkrum nakað, men tað skerst ikki burtur, at ferðin hjá 7. flokki í Vági hevur verið fyrireikað í áravís, og hevði tað ikki verið fyri fiskiskipini, so var einki samband um Suðuroyarfjørð og flokkurin úr Vági slapp ikki av oynni og enn minni út um landoddarnar á námsferð.

Á námsferðini skal 7. flokkur í Vágs Skúla vitja í Danmark og í Noreg.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

## VIÐMERKINGAR

# Fólkavaldu politikarar hyggi her?

**Hans Birgir Hansen**



Eg vil alment heita á fólkavaldu politikarar um at fáa endurskoða og dagført rúsdekkalógina og skerpa alt eftirliti við rúsdrekkasølu og útskeinkjan sum skjótast!

Eg vil alment heita á fólkavaldu politikarar um at endurskoða og dagføra tubbakslógina og skerpa eftirliti við blaðkioskum, matstovum, ølklubbum í Føroyum!

Eg vil hava tykkum at seta teimum forboð at selja øl og sigarettir til børn, ungdómar undir 18 ára aldursmark, so slepst undan øllum skaðum og viðgerðum! Eg vil hava tykkum at endurskoða og dagføra politiviðtøku fyri Tórshavn, ið er meira enn 100 ára gomul, og fáa ein standard politiviðtøku fyri alt landið!

Eg vil hava tykkum at fáa Fútaskrivstovuna og politistøðina at hondhevja áðurnevndu lógir og eftirlit, so vit sleppa undan teimum keðiligu avleiðingunum!

Tað skal setast øllum forboð at ferðast við Bygdaleiðir/Strandfaraskipum tá fólk eru sjónliga ávirkaði og tá hesi smakka sær á, á øllum farleiðum!

Tað skal sleppast vanlig ferðandi undan slíkum ólevnaði á øllum farleiðum og á Farstøðini í Havn!

Slíkt vil spara samfelagið/húsarhaldið 100 tals mió. kr. hvørt ár og sleppa okkum undan at familjur upploysast og hjún sundurlisin, ið rakar børnini ein sær!

Eg eri offur fyri eini røð av kensludrápum og samansvørjan við tí skipa terror/telefonterror ein líður undir í eini fremmanda og ómynduggeran í Havn!

Tað er ein andstygd at børn, ungdómar, tilkomin, eldri fólk í Havnini/Suðurstreymoy ið eru so ófólkaliga skikkaði og óuppdrigin heiman í frá, ið øll sýna mær!

Tað er hugstoyt at síggja hesi gerast samfelagstaparar, ið fingið hava niðursett heilaaktivitet við rúsdrekka og teldum og kunningar og samskiftistøkni!

# Munur á fagfelagsformonnum

**Sigrun Samuelsen**

Fyri einum góðum ári síðan boðaðu tvey arbeiðarafeløg okkum í verkfall, nú skuldi tímalønin verða tíðarhóskandi fyri limir teirra. Ingeborg og Vígdis fingu ein hampuliga góðan lønarsáttmála ígjøgnum, vit vóru nøgdar og fóru glaðar aftur til arbeiðis, eftir at hava verið í verkfalli í 3 vikur.

Men hvat hendir nú 1. mai í ár, hvar tímalønin skuldi hava eina stóra uppgongd, og hvar vit í nærum í ein heilan mánað hava hoyrt politikkara eftir politikkara víst á, hvussu vælferðin stendur í blóma í Føroyum, og landskassin hevur næstan 700 milliónir í yvirskoti.

Nú hevur Vígdis undirskrivað ein sáttmála, har vit frá 1. mai verða fastløntar, og helmingurin, ið arbeiða á Landssjúkrahúsinum, missa yvirtíðina og fara umleið 20% niður í løn. Hvussu kann ein fakfelagsformaður gera slíkt ímóti limum sínum, var tað bara fyri at toknast Ingeborg, at Havnar Arbeiðskvinnufelag var við í verkfallinum í fjør?